# Jann Ingi aftur á Toftum

**FÓTBÓLTUR** Eftir tvey ár í NSÍ og eitt hálvt ár í danska Skive, er Jann Ingi Petersen aftur í B68. Men hann sleppur ikki á vøllin við besta liðnum fyrr enn eftir summarsteðgin

Hilmar Jan Hansen

– Eg spældi við skaða ein part av kappingarárinum í fjør, og tá eg var til royndarvenjing í Skive, var eg framvegis skaddur. Nú eri eg so komin heimaftur, men havi gjørt stór framstig viðvíkjandi skaðanum, síðani eg kom aftur á Toftir. Tí vænti eg skjótt at vera klárur at spæla fótbólt aftur.

Tað sigur 27 ára gamli Jann Ingi Petersen, sum í vikuni skrivaði undir sáttmála við B68, so hann er knýttur at barndómsfelagnum hetta kappingarárið og tey bæði næstu við. Trupulleikin er tó, at av tí at flytingarvindeygað er latið aftur, kann hann ikki spæla við Vodafoneliðnum hjá B68 fyrr enn eftir summarsteðgin, tá vindeygað letur uppaftur.

– Tað verður nokk ikki so stuttligt at standa á síðulinjuni og hyggja at, meðan hinir spæla, sjálvt um eg eri klárur, men tað má eg so bara liva við. Eg venji við besta liðnum hjá B68 og kann spæla við liðnum í 2. deild, so eg má bara royna at gera meg kláran, til eg aftur havi loyvi at spæla við besta mansliðnum hjá B68, sigur Jann Ingi.

– Hinvegin er tað kanska ikki so galið allíkavæl, tí nú havi eg møguleika fyri at koma fyri meg í øllum góðum, uttan at eg fari ov skjótt fram. Tað kann í longdini koma at roynast betur fyri meg, og undir øllum umstøðum noyðist eg at taka tað, sum tað kemur.

Nakað eftir at fótbóltskappingin var liðug í fjør, flutti Jan Ingi Petersen til danska 1. deildarliðið, Skive IK, men skaðin gjørdi, at hann ongantíð veruliga kom í gongd har. Nú er hann so heima aftur og sær hóast alt ljósari upp á fótbóltin, tí hann merkir minni og minni til skaðan.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# B71 uttan heimavøll

**FÓTBÓLTUR** Ivasamt er, um nýggi graslíkisvøllurin á Sandi verður klárur til heimadystin hjá B71 sunnudagin ímóti KÍ. Tí er ein umrøddur møguleiki, at B71 spælir á Argjum í staðin

Uni Holm Johannesen



Kappingarskráin hjá Fótbóltssambandinum sigur, at B71 fær vitjan av KÍ í fyrsta umfarinum í landskappingini, sum verður avgreitt um vikuskiftið. Tað er hinvegin ikki vist, um sandoyingar sleppa at spæla dystin á Sandi.

Sandoyingar hava sjáldbodnir stríðst við at skifta graslíkið á vøllini inni í Dal seinastu vikurnar. Arbeiðið er framvegis ikki liðugt. Veðrið hevur darvað arbeiðinum, og ikki er reitt, um vøllurin verður góðkendur til vikuskiftið.

Nevndin í B71 hevur tosað við AB um at spæla dystin á Argjum. Møguleikin at spæla dystin í Klaksvík er eisini viðgjørdur, so sandoyingar fáa heimadyst móti KÍ seinni í kappingarárinum.




SPENNANDI

*Ein av teimum fýra fjórðingsfinalunum verður við Løkin millum NSÍ og EB/Streym, har runavíkingar skulu royna at seta sundalagsmenn av í steypakappingini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Fjórðingsfinalurnar klárar

**LØGMANSSTEYPIÐ** EB/Streymur, sum hevur vunnið tríggjar av síðstu fýra finalunum í steypakappingini, skal í fjórðingsfinaluni møta NSÍ á útivølli

Hilmar Jan Hansen

Mánakvøldið var lutakast um, hvussu tey átta liðini, sum eru eftir í kappingini um Løgmanssteypið, skulu spæla í fjórðingsfinalunum. Og ikki ber til at siga annað, enn at í øllum førum tríggir av teimum fýra dystunum kunnu gerast sera spennandi.

EB/Streymur, sum hesi seinnu árini hevur verið sterkasta steypaliðið í landinum, skal á útivølli spæla ímóti NSÍ, sum fyrr plagdi at koma langt, men seinnu árini ikki hevur yvirlivað fyrsta umfar. Fleiri vilja vera við, at EB/Streymur er besta liðið í løtuni, og so fæst at síggja, hvat NSÍ kann gera á heimavølli ímóti steypavinnarunum.

Ein annar áhugaverdur dystur er eisini eysturoyaruppgerðin millum Víking og B68, sum skal spælast í Gøtu. Víkingur vann steypakappingina fyri tveimum árum síðani og er ein lítil favorittur á heimavølli ímóti B68, sum ikki hevur nakað steyp á sínum avrikslista, men hinvegin sær út til at hava eitt spennandi lið í ár.

### Opið í Vágum

Eisini man tað heila standa rímiliga opið í dystinum millum uppflytararnar, 07 Vestur og KÍ. Vágamenn vóru sannførandi í sínum steypadysti ímóti FC Suðuroy, meðan KÍ ikki gjørdi meira enn neyðugt fyri at vinna á Undrinum. Greitt er undir øllum umstøðum, at eitt av liðunum í hálvfinaluni verður ein uppflytari.

Fjórði dysturin er millum tapandi steypafinalistarnar í fjør, ÍF, og niðurflytararnar í bestu deildini, AB. Argjamenn eru einasta av fjórðingsfinaluliðunum, sum ikki spælir í Vodafonedeildini, so tí man lítið vera at ivast í, at ÍF skuldi verið greiður favorittur. ÍF kom í fjórðingsfinaluna við stórsigri á Skála, meðan AB bara akkurát knógvaði TB.

Fjórðingsfinalurnar verða spældar mikudagin 4. mai, og síðani verður nýtt lutakast um, hvussu vinnandi liðini skulu spæla í hálvfinalunum, sum verða hósdagin 19. mai og týsdagin 14. juni. Finalan um Løgmanssteypið verður spæld í Klaksvík fríggjadagin 5. august klokkan 18.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Løgmanssteypið

**FJÓRÐINGSFINALUR**

4. mai Víkingur - B68
4. mai NSÍ - EB/Streymur
4. mai ÍF - AB
4. mai 07 Vestur - KÍ

**HÁLVFINALUR**

19. mai og 14. juni

**FINALA**

5. august (í Klaksvík)